# Perlur og fiól

**Tað var ein perlurøð av tónlistarligum tilfari, sum streymaði út gjøgnum hátalararnar á sandinum í Syðrugøtu, men sum tónleikaáhugaður føroyingur saknaði eg tað óvæntaða**

G! FESTIVAL
Johan Jacobsen
Johan@sosialurin.fo


Mynd: Ólavur Frederiksen

- Hendan sangin skrivaði eg stutt eftir Tsunami-vanlukkuna og so var Bush eisini akkurát afturvaldur til forseta, so stemningurin millum fólk var eitt sindur dapur. Nakað soleiðis presenteraði Teitur sangin "Louis, Louis" á G! ´06. Sangurin er ein kvøða til Louis Armstrong og biðir hann Armstrong koma aftur og syngja fyri heiminum, tí heimurin hevur brúk fyri honum - Louis Armstrong sang sangin "What a Wonderful World".

Men leygarkvøldið á G! var tað Teitur, sum sang fyri fólkinum. Og eftir øllum at døma hava vit brúk fyri tí - vit gjalda jú fyri atgongumerkið.

Teitur verður ofta settur í samband við Sing and Songwriter-sjangruna, har tónlistafólkið gjarna er ein, sum ger egin løg, syngur og spælir tey, oftast á gittar. At fella í eina sjangru slepst ikki undan, hugtakið stílur er yvir øllum listarligum úttrykkum. Eisini skal ein tílíkur "sing and Songwriter" hava eitthvørt uppá hjarta, sum fólk kunnu kenna seg aftur í - har skal vera eitt ávíst samskifti millum áhoyraran og sangin. Hetta tóktist ein at merkja undir konsertini, har bæði yngri og eldri á enskum sungu við Teiti og hansara monnum.

Fiólleikarin, Andreas Birk, passaði sera væl inn í fleiri av løgunum hjá Teiti. Av fremstu røð var hesin serliga væl móttikin av kvinnuligu áhoyrarunum. Til lætta og leikandi lagið "My Baby" hóskaði fiólin sera væl til og kryddaði lagið.

Flestu løgini á skránni hjá Teiti á G! vóru av tí seinastu útgávuni "Stay under the Stars".

Eitt lag snýr seg um ein innbrotstjóv, sum er í ferð við at gera sín gerning; eitt um ein tumlara og so er tað Louis Louis, sum er ein perla av eini útseting. Fleiri av løgunum hjá Teiti hava ein klassikara-dám yvir sær, ið ber boð um langa livitíð - hetta síðst nevnda er avgjørt tað mest framúrskarandi. Av seinastu útgávuni er lagið um tjóvin "Thief about to break in" og eisini "Hitchhiker" eitt tílíkt klassiskt lag.

## Sama skráin

Hóast allar hesar perlurnar og eina stak hugnaligu tónleikaløtu, so saknaði eg fleiri óvæntaði innsløg - t.d. aðrar sangir, sum ikki eru á hansara útgávum. Hetta kann kanska tykjast vera órímiligt at krevja, tí Teitur hevur jú ikki framført í Føroyum eftir, at hansara seinasta fløga kom út. Men, tá ið ein hevur verið á nøkrum konsertum hjá Teiti, so líkjast hesar nógv, um ein hugsar um val av sangum og útsetingum av sangum. Teir somu sangirnir ganga aftur á tónleikaskránni og útsetingarnar


Mynd: Ólavur Frederiksen

víkja í sera lítlan mun frá teimum á fløguútgávuni. Men tilfarið, sum maðurin hevur at bjóða føroyingum er framúr gott og hevur sent Teit á eina spennandi tónleikaferð út í heim. Og, tað er gleðiligt, at Teitur velur at steðga á G! og vónandi hoyra vit hann syngja okkum ein sang á næsta G!.



# Morgunmatur við manér

**Rundstykki, franskbreyð, rugbreyð og viðskeri í langar banar. Kaffi, te, djús og frukt. Morgunmaturin var framúr góður og eini 250 fólk ótu har dagliga**

G! FESTIVAL
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Fyrireikararnir av G! siga, at teir allatíðina arbeiða við at gera heildarupplivingin av festivalinum betri fyri hvørt ár. Ein partur av tí er sjálvandi at fáa umstøðurnar hjá teimum, ið tjalda eru so góðar sum gjørligt. Hóast tað enn er langt eftir á mál har, so kunnu vit eftir ársins útgávu av G! staðfesta, at morgunmaturin nú er framúr.

Undanfarin ár hevur tað eisini verið so, at tey á tjaldingarøkinum høvdu møguleika at fáa sær morgunmat, men tá ert tú ikki sloppin at sita inni og eta á høllini. Ei heldur hevur tá verið talan um sjálvtøkuborð, men eina pakkaloysn har tú fekk ein posa við øllum í, og tá var góðskan eisini so sum so.

Men í ár var øðrvísi. Hvønn morgun var stórt sjálvtøkuborð uppi í skúlanum. Gaman í, so kostaði tað 50 krónur, men tá fekst tú eisini alt tú kundi ynskja tær til morgunmat eftir eina langa nátt. Rundstykki, franskbreyð og rugbreyð. Smør, ost, súltutoy, sjokolátu, hunang, spejpylsu og rullupylsu. Súrepli, banin og appilsin. Djús, kaffi, te og kakao. Og tey, sum ynsktu eina øl aftur við morgunmatinum sluppu eisini at hava tað inn við.

Og fólk vóru glað fyri morgunmatin. Hvønn morgun frá klokkan nýggju og til tað stongdi klokkan eitt var fult av fólki og át. Damurnar, sum ansaðu eftir at ov mikið var til av øllum, lótu bara væl at og søgdu, at sum heild høvdu fólkini bara verið fitt.

- Eini 250 fólk hava vitjað her og etið, og bara einaferð bleiv tað óneyðuga rokaligt, so tað er bara óført, vistu damurnar, sum hildu skil á matinum at siga.

Jú, morgunmaturin á ársins útgávu av G! var framúr og tær hálvthundrað krónurnar, maturin kostar eru væl givnar út.

